## Barnahermenn latnir leysir

Í Nepal hava stjórnin og fyrrverandi maoistiski uppreistrarfelagsskapurin skrivað undir eina avtalu, sum tryggjar, at umleið 3.000 børn, ið hava virkað sum hermenn, verða latin leys. Síðani maoistarnir góvust við uppreistrinum fyri trimum árum síðani, hava børnini verið í legum, sum ST hevur havt umsjón við. Sambært avtaluni sleppa tey fyrstu børnini úr legunum tann 27. desember, og 40 dagar seinni skulu legurnar standa tómar. Ein talsmaður fyri ST sigur, at børnini sleppa at velja, um tey vilja fara í skúla, ella um tey vilja sleppa at byrja egið virksemi.



## Iran ørkymlar Pentagon

Amerikanski verjumálaráðharrin, Robert Gates, sigur seg vera ørkymlaðan av, at Iran hevur roynt eina rakett, sum ber rættiliga langt. Talsmaðurin hjá Pentagon sigur, at Gates er ikki tann einasti, sum er ørkymlaður av rakettroyndini. Tað eru fleiri, teirra millum Gordon Brown, sigur hann. Hvítu Húsini hava funniast hvassliga at iransku rakettroyndini. Talsmaðurin hjá Barack Obama, forseta, Mike Hammer, sigur, at rakettroyndin samsvarar ikki við iranska uppáhaldið um, at landið ætlar bara at brúka kjarnorku til friðarlig endamál.

# Nú kemur Føroya

**Í meiri enn 20 ár hevur verið arbeitt við leinging av flogvøllinum í Vágum. Í gjár var fyrsta viðgerð í tinginum at leingja flogvøllin til 1799 metrar, og í komandi viku verður arbeiðið boðið út, so skjótt verður farið í gongd at gera vøllin, sum í mesta lagi verður 1,8 kilometur**

FLOGVØLLUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

– Vit snakkaðu eisini um hetta í 1986.

Heini O. Heinesen stendur á tingsins røðarapalli í gjár.

Hann vísir á, hvussu ofta, og hvussu nógv er tosað um at byggja flogvøllin í Vágum út.

Og enn hevur Føroya Løgting ikki samtykt at byggja flogvøllin í Vágum út á 1799 metrar, men longu í komandi viku verður arbeiðið at leingja flogvøllin í Vágum boðið út.

Hinvegin hevur løgtingið longu gjørt av, at vøllurin skal leingjast til 1600 metrar. Tað var gjørt í 2007, tá flogvøllurin eisini varð yvirtikin.

Í gjár var altso uppskotið at leingja vøllin til 1799 metrar, umframt at byggja nýggjan terminal við vøllin, til fyrstu viðgerð í tinginum.

Á løgtingi sýntist eisini vera greið semja um, at vøllurin skal útbyggjast sum skjótast. Í hvussu so er 1600 metrar, og helst eisini 199 metrar afturat, um 365 milliónir krónur røkka til tað.

Metingarnar hjá Vága Floghavn vísa, at seinnu 199 metrarnir bert kosta umleið 60 milliónir krónur, sum er lítið í mun til fyrru 400 metrarnar, sum, tá teir eru einsamallir, kosta umleið 223 milliónir krónur.

### Tríggir burtur

Uppmøtingin í tinginum í gjár var lutfalsliga góð, men tað vóru nógv sum løgdu til merkis, at tríggir ávísir tingmenn ikki vóru til staðar: Sjúrður Skaale, sum hevur fingist mest við føroyska stavraðið í heyst. Poul Michelsen, sum hevur fylt forsíður við at tosa um óskilið í egnari samgongu, og John Johannesen, sum heldur, at føroyingar skulu hava bíligari ferðaseðlar við flogførum.

Til felags hava allir, at teir – saman við Bjarna Djurholm – hava fylt miðlarnar við spurningum um tað loysir seg at útbyggja flogvøllin í Vágum.

Og tað vóru nógv tingfólk, sum hildu tað vera undarligt, at júst hesir tingmenn ikki møttu á tingi í gjár. Hesir vóru tó allir burtur í arbeiðsuppgávum fyri tingið, og høvdu helst verið til staðar, tá uppskotið upprunaliga skuldi til viðgerar í fyrradagin, tá tað bleiv útsett, tí Johan Dahl landsstýrismaður ikki fekk komið.

### Ógreitt við nyttu

Tað er fleiri orsøkir til, at nøkur tingfólk vilja vera varin við at útbyggja flogvøllin í Vágum. Ein orsøk er, at talan er um nógvan pening, sum skal brúkast. Hóast talan er um 365 milliónir krónur, sum vóru fingnar til vega frá dønum.

Eitt annað er, at flogskiparar – kropp av kroppi – hava greitt frá, at teir stórliga ivast, um Sørvágur er besta pláss til flogvøll í landinum, meðan tyrluskiparar, sum kenna veðurviðurskiftini í Føroyum frá síni flúgving, meta Glyvursnes vera besta boðið til flogvøll.

Fyri lítlari viku síðan kom flogskiparafelagið við skrivi, har tað setti spurnartekin við, um 1799 metrar og stórur terminalur eru besta loysnin fyri flogvøll í Føroyum.

Stutt eftir vístu fleiri limir í felagnum á, at teir ikki vistu um, at hetta skriv var sent, tí teir høvdu onki fingið at vita, og staðfestu, at tað eru fleiri, sum meta loysnina í Vágum vera ta bestu.

– Eg havi tríggjar fjórðingar av limunum aftan fyri meg, sigur formaðurin í felagnum, og viðgongur, at skrivið ikki hevði verið fyri á fundi í felagnum.



*Tað er avgjørt fyri langari tíð síðan, at flogvøllurin í Vágum skal útbyggjast, men kostar tað ikki meira enn 365 milliónir krónur, so verður vøllurin 1800 metrar*
Mynd: Jens Kristian Vang

### Lokalmál

Men tað, sum merkir hetta mál, er, at tað eisini er eitt lokalmál. Vøllurin hevur altíð ligið í Vágum, og tað kemur heilt skjótt fram, at vøllurin hevur nógv at siga fyri Vágafólk.

Og í uppskotinum til at leingja vøllin stendur enntá, at leingingin av vøllinum er góð fyri lokaløkið.

Tað er eisini nógv, sum bendir á, at eisini millum flogskiparar hevur tað nakað at siga í teirra tilmæli, um teir búgva í Vágum ella aðrastaðni.

Flogskipararnir, sum úttala seg alment, um at vøllurin liggur best í Vágum, búgva í vestara partinum av landinum. Og tað er nógv, sum bendir á, at fjórðingurin av flogskiparunum, sum formaðurin í felagnum ikki fær við sær, búgva í vestara partinum av landinum.

Av teimum 26 limunum í felagnum hjá flogskiparunum, sum eru skrásettir á heimasíðuni, búgva nevniliga 6 vestanfyri, meðan 20 búgva aðrastaðni. Tað vil siga, at 23 prosent av limunum hava styttri enn eitt korter at koyra til arbeiðis.

Í tinginum ger tað sama seg galdandi. Tað eru Vágamenn, sum tosa heitast fyri at byggja vøllin út sum skjótast og sum mest.

Men hinvegin eru tað